# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 26.06.2017*

**<u>Bygdaráðsfundur: 26.06.2017 kl. 18.00 til kl. 18.30</u>**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Mál nr. 51/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið</u>**

<u>J.nr.18.20.00-G01-3-17</u>

**Malslýsing**

Onnur viðgerð av venjingarútgerð til Svangaskarð. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundi 29.05.2017.

Starvsnevndin hja B68, Tofta Ítróttarfelag, hevur átikið sær uppgávuna at kanna venjingarútgerð til venjingarhølið á Svangaskarði.

Tilboð varð biðið um frá einum veitara í Englandi og tveimum veitarum í Danmark. Mett verður, at útgerðin frá Proterapi passar best til hølið og í dygd og prísi.

**Tilmælir**

Á fundi 17.05.2017 mælir Mentanarnevndin til at taka av tilboðnum uppá venjingarútgerð til Svangaskarð, frá Proterapi, áljóðandi kr. 183.441,40 uttan farmagjald og mvg.

Á fundi 24.05.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin kr. 220.000, íroknað farmagjald og mvg, verður tikin av tøkum peningi.

**Broytingaruppskot**

Broytingaruppskot frá Kaj Eli Hansen um, at hetta verður tikið við í viðgerðini av Fíggjarætlanini fyri 2018.

**Avgerð**

Kaj Eli Hansen atkvøddi fyri broyitngaruppskotinum, Jóhannus Danielsen, Súni í Hjøllum, Petur Jákup Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu ímóti.

Jóhannus Danielsen, Súni í Hjøllum, Petur Jákup Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu fyri tilmælinum frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini. Kaj Eli Hansen atkvøddi ímóti.

Onnur viðgerð samtykt við 6 atkvøðum, Jóhannus Danielsen, Súni í Hjøllum, Petur Jákup Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu fyri. Kaj Eli Hansen atkvøddi ímóti.

**Mál nr. 52/2017 Vegir og ferðsla**
J.nr. 05.01.00-P20-1-17
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av tilboð uppá asfaltering. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundi 29.05.2017.

Arbeitt hevur verið við økjum, sum treingja til ábøtur og asfaltering. Har ímillum er økið sunnanfyri B68 húsið og runt um ovara vøll, Hjallavegur og Rókavegur.

**Tilmæli**
Á fundi 16.05.2017 mælir Tekniska nevnd til at biðja um tilboð uppá asfaltering av økjunum: Sunnanfyri B68 húsið og runt um ovara vøll, part av Hjallavegnum og part av Rókavegnum.

Á fundi 24.05.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, viðv. asfaltering av nevndu økjum.

**Málslýsing**
Fíggjarnevndin hevur innheintað tilboð uppá asfaltering av omanfyri nevndu økjum. Tilboðini frá EM Asfalt og eru uppá íalt kr. 1.242.471,32 v/mvg.

**Tilmæli**
Fíggjarnevndin mælir til at taka av tilboðnum frá EM Asfalt áljóðandi kr. 1.242.471,32 v/mvg, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

Kaj Eli Hansen mælti til, at atkvøða í tveimum, tá talan er um 2 tilboð.

**Avgerð**
*Tilboð uppá økið sunnanfyri B68 húsið og runt um ovara vøll er áljóðandi kr. 396.458,70 v/mvg.*

Jóhannus Danielsen, Súni í Hjøllum, Petur Jákup Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu fyri at taka av tilboðnum. Kaj Eli Hansen atkvøddi ímóti.

*Tilboð uppá part av Hjallavegnum og part av Rókavegnum kr. 846.254,50 v/mvg.*

Tilboðið var einmælt samtykt.

Onnur viðgerð, av asfaltering sunnanfyri B68 húsið og runt ovara vøll, samtykt við 6 atkvøðum, Jóhannus Danielsen, Súni í Hjøllum, Petur Jákup Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu fyri . Kaj Eli Hansen atkvøddi ímóti.

Tilboðið um asfaltering av einum parti av Hjallavegnum og einum parti av Rókavegnum, var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 26.06.2017*

**<u>Mál nr. 53/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir</u>**
<u>J.nr. 02.01.00-P20-1-17</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 28.03.2017 verður søkt um at fáa til keyps lendið, til grundstykki til sethús, burtur av matr. nr. 404a, sum er sunnanfyri húsini á Regnavegi 48.

**Tilmæli**
Á fundi 16.05.2017 mælir Tekniska nevnd til at biðja Teknistovuna í Gøtu um at gera eina verkætlan yvir økið frá endanum av Lýðarsvegnum og inn til Regnaveg 48.

**Málslýsing**
*Eftirfylgjandi hevur tekniski leiðarin fingið eina verkætlan frá Teknistovuni í Gøtu.*

**Tilmæli**
Á fundi 14.06.2017 mælir Tekniska nevnd frá, at verkætlanin, sum nú fyriliggur, verður gjørd.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd einmælt samtykt.

**<u>Mál nr. 54/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir</u>**
<u>J.nr. 02.34.02-P20-7-17</u>
**Málslýsing**
Í skrivi 28.03.2017 søkir Eli Frederiksberg um at fáa til keyps lendið, til grundstykki til sethús, burtur av matr. nr. 404a, sum er sunnanfyri húsini á Regnavegi 48.

**Tilmæli**
Á fundi 14.06.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta umsøkjaranum lendi til grundstykki, sunnanfyri Regnaveg 48, burtur av matr. nr. 404a.

Umsøkjarin má sjálvur finna eina loysn við vegnum og bera kostnaðin av vegnum, og tí tað kostar at umleggja høvuðsvatnleiðingina, um tað vísur seg at verða neyðugt.

Kommunan kemur ikki at gera veg til grundstykkið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 26.06.2017*

**Mál nr. 55/2017 Tilbúgvingarvirksemið**

J.nr. 14.00.00-P15-1-17

**Málslýsing**

Sambært tilbúgvingarlógina, LL um tilbúgving frá 15. Mai 2012, kap. 3 § 13, er álagt øllum kommunum at gera eina tilbúgvingarætlan í mun til váðan í kommununi. Endalig tilbúgvingarætlan skal góðkennast av bygdarráðnum og sendast landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum til kunningar.

Skálafjarðar Sløkkilið hevur tilevna eina tilbúgvingarætlan, í tøttum samstarvið við tilbúgvingarnevndina hjá Skálafjarðar Sløkkiliðið, Vørn og Brunaeftirlitinum.

Tilbúgvingarætlanin var løgd fyri kommunustýrunum á Skálafjørðinum tann 22. mai 2017.

**Tilmæli**

Á fundi 14.06.2017 mælir Tekniska nevnd til, at tilbúgvingarætlanin verður góðkend, sum hon fyriliggur.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 56/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.22.00-G01-1-17

**Málslýsing**

Tekniska nevnd hevur áður fingið heimild til at avgreiða átrokandi byggimál og onnur teknisk mál í summarfrítíðini, og er ynski um, at soleiðis eisini verður í ár.

**Tilmæli**

Á fundi 14.06.2017 mælir Tekniska nevnd til, at nevndin fær heimild til at avgreiða átrokandi mál í summarfrítíðini 2017.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 57/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerð**

J.nr. 02.01.00-P20-3-17

**Málslýsing**

Tekniska nevnd hevur arbeitt við at finna øki til komandi útstykkinga, og hevur hugt eftir økjum, á Gaddavegnum norðanfyri verandi útstykking, á Høganesvegnum norðanfyri verandi útstykking, og undir Nesinum, norðanfyri verandi útstykking.

**Tilmæli**

Á fundi 14.06.2017 mælir Tekniska nevnd til – sum eina byrjan - at kommunan ognar sær lendið, og ger eina verkætlan yvir:

1. 8 grundstykkir á Gaddavegnum, norðanfyri verandi útstykking.
2. 8 grundstykkir á Høganesvegnum, norðanfyri verandi útstykking.

Á fundi 21.06.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd, og at fíggingin verður tikin við í viðgerðini av fíggjarætlanini fyri 2018.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 58/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið**
18.15.00-S49-1-16
**Málslýsing**
Ungdómshúsið, hevur havt sítt virksemið í bygninginum hjá BankNordik, men hevur fingið uppsøgn til 15. juli 2017.

Nevndin í Ungdómshúsinum hevur heitt á Nes kommunu um at fáa hølir til vega, so virksemið í Ungdómshúsinum kann halda fram. Í tí sambandinum hevur Trivnaðarnevndin og nevndin fyri ungdómshúsinum kannað møguleikarnar fyri at flyta vikrsemið í ”lítla skúla”.

**Tilmæli**
Á fundi 19.06.2017 mælir Trivnaðarnevndin til, at virksemið hjá Ungdómshúsinum verður flutt í ”lítla skúla”, sum eina royndartíð, fyribils í 1 ár.

Byrjað verður eftir summarfrítíðina, og virksemið fer fram eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 59/2017 Sosial og heilsuvirksemið**
J.nr. 16.00.09-P17-1-17
**Málslýsing**
Heilsutrygd hevur sett fram fyrispurning, um kommunurnar við Skálafjørðin eru sinnaðar at veita hølir og útgerð til tann 4. kommunulæknan, sum Heilsumálaráðið umhugsar at seta í starv í økinum. Í løtuni eru 3 kommunulæknar knýttir at Skálafjarðar læknadømi, og húsast teir í Heilsudeplinum í Runavík, eins og ein teirra aðru hvørja viku er í læknaviðtaluni á Strondum.

**Tilmæli**
Á fundi 19.06.2017 mælir Trivnaðarnevndin til at virka fyri, at 4. kommunulæknin kann setast í starv í Skálafjarðar læknadømi beinanvegin, og nýta verandi læknahølir í økinum. Harumframt verður mælt til, sum skjótast at útbyggja Heilsudepilin í Runavík, so skjótt og skynsamt sum gjørligt, soleiðis at 4. kommunulæknin eisini kann húsast har í framtíðini.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 26.06.2017*

**Avgerð**
Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var einmælt samtykt.